# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Jógvan Simonsen 60 ár



Í dag, fríggjadagin 8. apríl, fyllir Jógvan Simonsen, vanliga nevndur Egga, í Saltangará 60 ár.

Jógvan er ættaður úr Saltangará. Foreldrini vóru Karolina, f. Petersen, ættað av Selatrað, og Esbern Simonsen, úr Saltangará, og hann er nummar fimm av sjey systkjum.

Jógvan er giftur við Sofíu, f. Midjord, úr Fuglafirði. Tey hava búð í Fuglafirði til fyri umleið trimum árum síðan, tá tey keyptu barnaheimið hjá Jógvani á Høgabóli í Saltangará, har tey búgva í dag.

Jógvan er kendur, sum ein pionérur á fleiri økjum, hann var ein tann fyrsti, sum byrjaði við oljufýrservice í Føroyum. Men tað er serliga innan tyrluflúgving hann hevur gjørt vart við seg. Hann hevði stóran áhuga í tyrluflúgving, og saman við øðrum leigaði hann eina tyrlu úr Danmark til royndarflúgving. Ætlanin var at royna, hvussu tyrluflúgving royndist í Føroyum, og hvør tørvurin var.

Hesar royndir vístu, hvussu átrokandi tað var at fáa tyrluflúgving í Føroyum. Nøkur ár senni keypti landið sína egnu tyrlu, og Jógvan varð settur sum leiðari á tyrludeildini hjá Strandfaraskipum Landsins.

Jógvan hevur eisini roynt seg á øðrum økjum. Hann átti og rak fyritøkuna Fuglafjarðar Skipaavgreiðsla, og eitt tíðarskeið var hann reiðari á rækjutrolaranum Borgini. Hann hevur eisini arbeitt, sum kaifúti í Fuglafirði. Seinni bleiv hann stjóri á Bergfrost í Fuglafirði.

Hann hevur eisini arbeitt uttanlanda, hann var t.d. sølumaður hjá Faroe Seafood í Hirtshals og leiðari hjá AWI-Boats í Uumanaaq í Grønlandi.

Í dag tekst Jógvan við at umvæla barnaheimið hjá sær á Høgabóli og er onkran túr til sjós.

Fía og Egga eiga fýra børn, sum øll búgva í Havn: Billa Jóhanna, Jóhan Esbern, Súsanna og Durita. Eisini eiga tey fimm ommu- og abbabørn, Suffía, Martha, Jógvan Pauli, Marin og Bogi.

Vit ynskja babba hjartaliga tillukku við degnum

**Børnini**

# Fleiri persónbilar seldir

**Fyri fyrstu ferð í langa tíð er samlaða sølan av nýggjum akførum størri í mun til í undanfarna ár. Sølan av persónbilum er vaksin við 17,5 prosentum, meðan sølan av t.d. vøruvognum er minkað**

BILHAGTØL

Í nýggjasta tíðindaskrivinum frá Bileftirlitinum sæst, at sølan av nýggjum persónbilum er vaksin við umleið 40 bilum, meðan sølan av øðrum bilum er minkað. Frá januar til og við mars í fjør vórðu seldir 234 persónbilar í mun til 275 í ár. Samlaði vøksturin var upp á 5,3 prosent.



### Hagtøl fyri skráseting av nýggjum akførum fyri fyrsta ársfjórðing í 2005 og 2004

| Akfaraslag | Mars 2005 | Mars 2004 | Broyting Mar 04/05 | Jan-Mar 2005 | Jan-Mar 2004 | broyting 2004/2005 | %broyting 2004/2005 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Hýrubilar | 0 | 7 | -7 | 2 | 8 | -6 | -75,00% |
| Lastbilar | 1 | 0 | 1 | 1 | 6 | -5 | -83,33% |
| Motorsúkkla | 1 | 1 | 0 | 2 | 2 | 0 | 0,00% |
| Neyðsendakfar | 1 | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 | |
| Persónbilar | 118 | 102 | 16 | 275 | 234 | 41 | 17,52% |
| Smábussar | 1 | 1 | 0 | 2 | 2 | 0 | 0,00% |
| Tangabilar | 2 | 0 | 2 | 3 | 0 | 3 | |
| Viðfestivognar | 5 | 7 | -2 | 12 | 20 | -8 | -40,00% |
| Vøruvognar | 14 | 22 | -8 | 40 | 49 | -9 | -18,37% |
| Samlað | 143 | 140 | 3 | 338 | 321 | 17 | 5,30% |

Tað eru skrásett 57 nýggj prutl í fyrsta ársfjórðingi 2005, samanborið við 36 nýggj prutl í fyrsta ársfjórðingi 2004.

## Tøkk

Elskaða mamma, vermamma, omma
og langomma okkara

**Anna av Kák**

fødd 4. august 1931, doyði heima 23. mars 2005.

Vit systkin takka øllum fyri alt, sum tit hava verið fyri og havt saman við mammu gjøgnum hennar lív.
Takk fyri samkenslu, hjálp og uppmerksemi av øllum slag, meðan mamma var sjúk og tá mamma doyði.
Takk fyri øll tit, sum saman við okkum fylgdu mammu til gravar.

**Ingibjørg, Katrin, Jógvan, Jákup og Petur**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg fyri sýnda samkenslu,
tá góða kona mín

**Sanna Joensen**
Skúvoy

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til tykkum, ið hjálptu henni, tá hon brádliga bleiv sjúk.
Ein tøkk til tyrlumanningina.
Tøkk til kirkjutænarar, prest, sangarar og berarar.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Sclerosufelagið.
Hjartans tøkk til tykkum, ið hjálptu við ervinum
og tykkum, ið fylgdu henni til gravar.

**Maður tín,**
**Jógvan Joensen**

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!